# Trivnaðarkanning av ungdóminum í Havn



*Trivnaðurin millum skúlanæmingar í Havn skal nú kannast*

*savnsmynd*

**Vála oman niðan Áarvegin, tónleikur, forelskilsi, klandur og skúlating. Ja, mangar eru myndirnar av ungdóminum í Havn, men hvussu trívist hann og hvørjir dreymar hevur hann?**

TRIVNAÐARKANNING
*Tíðindaskriv frá Tórshavnar kommunu*

Mánadagin 31. januar fáa allir næmingar í framhaldsdeildunum í Havn teldubræv frá Tórshavnar Kommunu, har heitt verður á teir, um at taka lut í stórari spurnarkanning av trivnaðinum hjá ungdóminum í kommununi.

Spurningarnir, sum settir verða í kanningini, snúgva seg um alt frá dansiviðurskiftum til lummapening. Harumframt er orðið eisini frítt, og næmingarnir fáa høvi at greiða frá, hvat teir høvdu gjørt fyri børn og ung, um teir sluppu at ráða í Tórshavnar Kommunu.

Tað forkunnuga við kanningini er, at hon einans er teldutøk, og at allir spurningar verða svaraðir á eini heimasíðu, sum er gjørd til endamálið. Hvør einstakur næmingur fær eitt loynital, sum skal brúkast fyri at fáa atgongd til síðuna. Fyrimunurin við teldutøku kanningini eru nógvir. T.d. skulu úrslitini av kanningini ikki tastast inn á eitt telduforrit, men kunnu verða nýtt beinanvegin. Eisini verður roknað við, at tað er lættari og hóvligari hjá næmingunum at svara spurningunum online enn við penn og papír.

Í samráð við skúlaleiðslurnar er avgerð tikin um, at næmingarnir kunnu nýta teldurnar á skúlunum til endamálið, tí ikki allir næmingar hava atgongd til teldu og Internet heimanífrá.

Tað er ein arbeiðsbólkur undir Mentamáladeildini hjá Tórshavnar Kommunu, sum hevur sett kanningina í verk, í sambandi við, at bólkurin er í fer við at skriva eitt álit um børn og ung í Havn.

Vónandi fer kanningin at geva eitt innlit í trivnaðin hjá ungdóminum, og nøkur hugskot til politisk tiltøk næstu árini.

Afturfyri ómakin verður lutakast millum flokkarnar, sum luttaka í kanningini, har vinningurin verður eitt hugnakvøld fyri flokkin við bowling og pizza.

Seinasta freist at svara spurningunum er 18. februar 2005.

# Familjutiltak á Læraraskúlanum

Leygardagin fara pedagog-lesandi at skipa fyri stórum familjudegi á Læraraskúlanum.

Frá fyrireikarunum verður sagt, at undirhald av ymsum slag verður á skránni. Eitt kunnu børnini - og eisini tey vaksnu - royna fiskibrunnar, loppumarknað, karaokee og køkutombola, og hartil koma klovnar á vitjan. Undirhaldinum annars fer Johan í Kollafirði at standa fyri.

-jm

Sær betur út á Føroyabanka:

# Fiskurin er feitari men minni er til



*Fiskurin á Føroyabanka er nú feitari aftur, men nógv minni er til, og fiskurin er smærri, enn hann hevur verið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Síðan ár 2000 er toskurin á Føroyabanka vorðin alsamt meira rak. Lívfrøðingar halda, at tað er minkandi føðin, sum hevur verið atvoldin til hetta. – Men nú er líkt til, at vend er komin í, og fiskurin er feitari aftur, sigur Eyðfinn Magnussen, biologur og vísir til nýggjastu kanningarnar, sum fólk frá Fróðskaparsetrinum og Fiskirannsóknarstovuni hava gjørt við Magnusi Heinasyni**

FISKASTOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað gongur sjáldan bara ein veg í náttúruni – og sum heild hjá øllum tí, sum livir og andar. Viðhvørt gongur væl, og viðhvørt gongur minni væl. Men tað gongur sjáldan bara væl og sjáldan bara illa. Viðhvørt eru fiskastovnarnir væl fyri, og viðhvørt eru teir minni væl fyri. Søgan sigur okkum, at tað vendir altíð, sum tíðin gongur, bæði hendanvegin og handanvegin.

## Sær betur út

Í september 2004 var Magnus Heinason á Føroyabanka og gjørdi regluligar yvirlitstrolingar.

Fólk frá Fróðskaparsetri Føroya og Fiskirannsóknarstovuni vóru við havrannsóknarskipinum og Eyðfinn Magnussen, biologur, sum starvast á Fróðskaparsetrinum, hevur skrivað frágreiðing um kanningarnar.

– Síðan ár 2000 er toskurin á Føroya Banka vorðin alsamt meira rak, og seinastu árini er hann minkaður 15% í fiti. Men nú er vend komin í aftur, og fiskurin er vorðin feitari aftur.

Eyðfinn Magnussen sigur, at toskur, hýsa og upsi á Føroyabanka nú eru millum 3 og 5% feitari, enn tey hava verið seinastu undanfarnu árini.

Hann heldur, at tað eru náttúruviðurskiftni við minkandi føði á Bankanum, sum hava verið atvoldin til, at fiskurin gjørdist so rak.

## Nógv minni veiða

Nýggjastu kanningarnar hjá Magnusi Heinasyni vísa eisini, at miðalveiðan av toski, hýsu og upsa er minkað munandi í fjør í mun til árið fyri. Toskaveiðan er minkað við 55%, hýsuveiðan við 20 og upsaveiðan við 33%.

– Men tað er ikki bert minni til av fiski á Bankanum; fiskurin er eisini smærri. Helvtin av toskinum er minni enn 68 cm. Hetta er væl minni enn miðskeiðis í nítiárunum, tá ið miðallongdin á toski var millum 85 og 90 cm. Nú eru einans 4% av toskinum størri enn 90 cm.

Eyðfinn Magnussen vísir á, at tað óivað er tað stóra veiðitrýstið, sum hevur verið á Føroyabanka, ið er atvoldin til, at toskurin ikki hevur havt møguleikar at veksa seg stóran.

– Eisini upsin á Bankanum er smáfallandi. Kanningarnar vísti, at helvtin av upsanum er 52 cm. til longdar. Hetta er 4-5 ára gamal upsi – og er saman upsastøddin, sum fingin varð í 2003. Miðallongdin á hýsuni var 45 cm., sum er 3-4 ára gomul hýsa.

## Hitin lækkar

Á kanningarferðini hjá Magnusi Heinason í heyst máldu teir eisini hitan við botnin.

– Hesar kanningar vístu, at sjógvurin á Føroyabanka er eitt sindur kaldari nú enn fyri einum ári síðan.

Eyðfinn Magnussen sigur, at síðan 1999, at hitin støðugt vaksin, úr 10,44 stigum upp í 11,24 stig í 2003.

– Miðalhitin hendan túrin var 10,95 stig, sum er 0,29 stig kaldari enn somu tíð í fjør, sigur Eyðfinn Magnussen, biologur.